# Tað er besta norðhavstíð – men

*Teir leggja til bryggju – eftir langan dag á Norðhavinum. Á bryggjukantinum gongur Tummas Súni við blokkinum og skrivar niður, hvussu nógv bátarnir hava*



**Í góðveðrinum mánakvøldið var Sosialurin ein túr norðuri á Eiði, tá ið bátarnir, sum royna við snellu á Norðhavinum og leggja veiðina upp á Eiði, komu aftur av útróðri. Fiskiskapurin var smáligur; flestu bátarnir høvdu millum 200 og 300 pund eftir langan dag. Besti báturin hevði eini 700 pund, og tað er ikki nakar stórur útróðrardagur í bestu norðhavstíð**

VÁRTÍÐ
*Orð & myndir:*
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í flestu førum eru tveir mans á hvørjum báti; í onkrum føri bert tann eini. Tíðliga verður loyst á morgni, og seint verður bundið aftur um kvøldið, um veðrið er til vildar. Hetta eru langir dagar, men hugaligt er, tá ið fiskur er at fáa. Smáligt hevur verið við snelluni higartil í vár, og torført er at spáa um, hvussu seinni parturin av vártíðini man fara at roynast.

Veiðimaðurin missir ongantíð mótið. Annars hevði hann ikki verið veiðimaður. Hvør dagur er ein nýggjur dagar – við nýggjum vónum og nýggjum møguleikum. Vignast seinna hálva av vártíðini, kann vera, at nakað er fingið burtur úr, tá ið liðugt er, og bátarnir aftur stevna suður gjøgnum Sundalagið, haðani teir eru komnir.

### 40-50 bátar

Meðan vit vóru á Eiði, komu fleiri bátar aftur at landi, men lítið hevði borið til hendan góðveðursdag. Einir 30 bátar høvdu lagt fiskin upp, áðrenn vit fóru avstað aftur, og besti báturin hevði góð 700 pund.




*Aftur ein snellubátur er komin inn um pierin – og bíðar nú eftir landingartørni. Tað gongur skjótt at landa bátarnar, tí nøgdirnar eru so smáar*



*Ungur snellumaður leggur bátin til bryggju á EiðI*



*Stórur og vakur toskur, men nøgdirnar eru ikki stórar í bestu norðhavstíð*